# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlaflokkur í 1957

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er ein realskúlaflokkur í 1957.

**Aftast f.v.:** Arnbjørn Randrup Thomsen, Heðin Mikkelsen, Tórður Debes Joensen, Johan Nielsen og David Hansen.

**4. rað f.v.:** Mads Winther Lützen, Magnus Pauli Magnussen, Páll Johansen, Kjartan Kristiansen, Anfinn Rubek Nielsen og Hendrik Rubeksen.

**3. rað f.v.:** Turid Olsen, Birgit Akraberg Hansen, Anna Skaale og Ann Poulsen.

**2. rað:** Margit Veyhe

**Fremst f.v.:** Marjun Olsen, Hanna Sundstein og Turid Simonsen

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 297)

*Myndaeigari: Turid Winther*



## Andlát og jarðarferðir

**Kjartan Nolsøe, av Tvøroyri** andaðist sunnudagin 77 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Jens Lisberg** fer úr kapellinum mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni hósdagin kl. 15.

**Esther Djurhuus í Tórshavn** andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnukvøldið, 87 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 20. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Esther, kunnu lata Føroya Symfoniorkestri eina peningagávu. Konta í Norðoya Sparkassa.

**Amanda Jacobsen**, ættað úr Runavík, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 86 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju fríggjadagin kl. 13.

†

**Johanna Mathea Skaale**
Tórshavn

andaðist 5. mai, 101 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin 9. mai, kl.15.

**Børnini**

Tey, ið vilja minnast Johannu, kunnu lata eina peningagávu til Ellisheimið. Konta í Eik Banka

## MC Boogie

Leygardagin 3. mai var tann árligi felagstúrurin MC Boogie, ið er fyri øll motorsúkkluáhugaði í Føroyum. Tað var Føroya MC, ið skipaði fyri hesum túrinum.

Leygarmorgunin møttu yvir hundrað motorsúkklur á Shellstøðini við Ringvegin í Havn. Síðan varð koyrt ein túr runt í Havn, áðrenn leiðin gekk norður eftir. Steðgað varð við Shellstøðina við Streymin, og eftir ein steðg gekk leiðin norður til Eiðis um Eiðisskarð og til Funningsfjørð, og suður aftur gjøgnum Sundalagið.

Koyrt varð síðan gjøgnum Vágatunnilin til Sørvágs. Við Vága kunningarstovu í Miðvági varð ein steðgur, har motorsúkklukoyrarnir fingu kaffi og skipað varð fyri ymiskum kappingum.

Um kvøldið varð veitsla í felagshúsinum á Velbastaðvegnum í Havn.






*Mynd: Brynjálvur Petersen*

**Dagurin**
**8. mai. Stanislaus**, deyður í 1079. Biskupur í Karkow. Hann varð tikin av døgum, tí hann hevði at konginum Boleslav. Tjóðarhalgimenni hjá póllendingum.